

# Festlig og litrík Nýggjárskonsert

**Leygarkvøldið var stóra árliga Nýggjárskonsertin hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum. 650 fólk høvdu leitað sær í Norðurlandahúsið leygardagin. Frálík til tónleikur frá Symfoniorkestrinum, eina fantastiska Eivør, og Helena Dam á Neystabø leikandi á sjampanjugaloppinum myndaði ársins litríku Nýggjárskonsert, umframt spældu nýtt verk**

KONSERT
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tað vóru 650 fólk, ið høvdu ognað sær atgongumerki til á Nýggjárskonsertina hjá Symfoniorkestrinum leygarkvøldið. Fyri mong er Nýggjárskonsertin nakað heilt serligt, og sæst tað aftur á atgongumerkjunum, ið vórðu rivin burtur longu tíðliga í desember.

Skráin fyri Nýggjárskonsertina var fjølbroytt við kendum verkum, sum Symfoniorkestrið framførdi afturvið kór- og solosangi. Tvær stórhendingar innan symfonitónleik fóru fram hetta kvøldið. Nýggja verkið eftir Atla Kárason Petersen, sum hevði gjørt lag til yrking eftir William Heinesen, varð framført, og nýggja harpan hjá Symfoniorkestrinum varð tikin í brúk. Harafturat var Eivør gestasolistur, og framførdi hon egið lag, umframt eitt eftir Petur Pólson og eitt eftir Anniku Hoydal.

Tað var nakað lætt og festligt yvir framførsluni hjá Symfoniorkestrinum. Nakað, sum var við til at seta festliga dámin á konsertina, var tá Helena Dam á Neystabø var solistur í stykkinum um sjampanjugaloppin. Nakrar ferðir skuldi galoppurin roynast, áðrenn hann ljóðaði sum hann skuldi.

Tá Bernharður Wilkinson hevði fingið fólk at klappa í takt, bæði við størri og smærri armrørslum, var ikki frítt fyri at tað prikaði í hondunum, og tey flestu mundu fara smílandi avstað aftur.

Samanumtikið ein litrík og festlig Nýggjárskonsert, sum staðfestir høga støðið á føroysku symfoniorkesturtónleikarunum og sangarum.

Vit lata myndirnar á hesum síðum tala fyri seg.





